# Eitt arbeiði sum munar

**Hesa vikuna hevur Skandanaviska Barnamissiónin møtirøð í Føroyum. Sum liður í hesum verður peningur eisini savnaður til hjálpararbeiðið hjá felagsskapinum. Eitt hjálpararbeiði, sum í fleiri ár hevur gjørt ein veruligan mun í fyrrverandi russiska lýðveldinum**

MISSIÓNSARBEIÐI

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Møtirøðin byrjaði á Lindini leygarkvøldið, og sunnudagin vóru móti hildin á Argjum og í Havn.

Fram til mánadagin komandi verða møti hildin kring alt landið, og eru tað væl kend umboð hjá barnamissiónini, sum standa fyri hesum. Bo Wallenberg, sum er leiðari av Skandinavisku Barnamissiónini, verður saman við Lyudmilu Lonyuk úr Ukraina á ymsu støðunum. Og til ber sjálvandi at tosa við tey um, hvat tað er fyri arbeiði, sum sjálvboðni felagsskapurin stendur fyri.

## Søgulig eyðræning

Lyudmila er leiðari av Skandinavisku Barnamissiónini í Ukraina, har Barnamissiónin hevur framt eitt stórt arbeiði gjøgnum fleiri ár.

Ukraina er søguliga eitt av fátækastu pørtunum av gamla Russlandi. Ikki minst var landið fyri sannari eyðræning – bæði av menniskjum og av tilfeingi – tá Josef Stalin drap milliónatals kulakkar í síni embætistíð. Kulakkar, sum einaveldisharrin segði mótarbeiddu kollektiviseringini. Samlaða talið ber illa til at uppgera neyvt, men søgufrøðingar siga, at talan í minsta lagi var um 7-8 milliónir fólk, sum tá máttu lata lív.

Og hóast hetta hendi fyri hálvari øld síðani, so er landið framvegis ikki komið seg.

Eisini í nýggjari tíð er landið rakt av vanlukkum. Í apríl mánaði í ár eru 20 ár liðin, síðani reaktor nummar 4 á Tjernobyl-verkinum sprongdist, men árinini av hesum merkjast eisini í dag.

Gjøgnum arbeiði sítt hevur Barnamissiónin tó virkað fyri at betra um korini hjá teimum, sum vórðu rakt av hesum. Fleiri ferðir hevur bólkur av ukrainskum børnum verið á Føroya-vitjan. Fyrst og fremst, so at tey kunnu njóta gott av reinu náttúruni, sum ikki er fongd av radioaktivu geislingunum, men eisini so at tey kunnu njóta tann friðin og tann tryggleikan, sum valdar í føroyska samfelagnum, tá sammett verður við tað, sum hesi børn eru von við.



*Tað er á fleiri økjum, at føroyska deildin av Barnamissiónini hevur givið sítt ískoyti. Hendan myndin er frá einum sjúkrahúsi fyri krabbameinsrakt børn*

## Hjálp til eitt nýtt lív

Alt arbeiðið, sum Skandinaviska Barnamissiónin ger, er sjálvboðið. Verður hugt at samlaðu tølunum, so er eyðsæð, at hóast vit her í Føroyum eru fáment, so kunnu vit eisini gera góðan mun.

Samanlagt hevur føroyska deildin av Barnamissiónini sent góðar 331 tkr. til Ukraina hesi seinastu níggju árini. Bæði sum neyðhjálp og sum liður í hjálp, sum skal røkka longur enn bara til dagin í morgin.

Ein av verkætlanunum, sum er stuðlað, er arbeiðið at hjálpa kvinnum, sum sita í kvinnufongsli í Milipol. Talan er her um blaðungar kvinnur, sum av ymsum ávum eru sendar í fongsul. At hjálpa hesum hevur Barnamissiónin samstarv við eina fríkirkju á staðnum, og á hendan hátt ber til at hjálpa ungu kvinnunum aftur á beint. Fyri nøkrum árum síðani vórðu bíbliur lætnar øllum kvinnunum í fongslinum, soleiðis at hesar hava skipað seg í ein bíbliubólk.

Næsta stigið er at hjálpa hesum í tilveruni, sum kemur, eftir at tær eru leyslætnar. Ætlanin er her at lata upp eitt heim til endamálið, so kvinnurnar ikki koma beina leið út aftur í hungur, heimloysi og lógloysi.

## Skráin komandi dagarnar

| Dagur | Klokkan | stað |
|---|---|---|
| Mánadagin 26/2 | 18.00 | Evangeliihúsið í Tórshavn |
| | | Jannet Olsen syngur |
| Týsdagin 28/2 | 20.00 | Keldan í Skálafirði |
| | | Kristel og Jens Lisberg syngja |
| Mikudagin 1/3 | 20.00 | Solo Deo Gloria, Klaksvik |
| Hósdagin 2/3 | 20.00 | Oasan í Hoyvík |
| | | Jannet Olsen syngur |
| Fríggjadagin 3/3 | 21.00 | Konsert á Læraraskúlanum í Havn |
| | | Angela skipar fyri |
| Leygardagin 4/3 | 20.00 | Miðvágs Missiónshús |
| | | Lovinda Halgaklett og ungdómskórið syngja |
| Sunnudagin 5/3 | 10.30 | Lívdin í Hoyví8k |
| | | Jannet Olsen syngur |
| Sunnudagin 5/3 | 19.00 | Ebenezer í Havn |
| | | Sangbólkurin luttekur |
| Mánadagin 6/3 | 20.00 | Frelsunarherurin í Vági |

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 8 2006

# Íslendski marknaðurin rættaði seg aftur

MARKNAÐARRÁK

Týsdagin og mikumorgunin í farnu viku lækkaði íslendski partabrævamarknaðurin tilsamans 9%. Orsøkin var, at kredittmetingarfelagið Fitch niðurmetti kredittvirðið hjá íslendska tjóðbankanum. Moody's og S&P, sum eru tey bæði størru kredittmetingarfeløgini, meta tó enn íslendska búskapin sum støðugan. Lækkingina av partabrævakursunum týsdagin tók marknaðurin sum ein góðan møguleika at keypa inn. Longu frá mikumorgni hækkaðu kursirnir aftur, og eru nú á umleið sama stigi sum áðrenn metingin frá Fitch kom. Hósmorgunin kom Fitch eisini við teirra meting av íslendsku bankunum. Hesir varðveita allir sína høgu kredittmeting.

## Renturnar friðarligar

Februar mánaði hevur verið sera friðarligur á lánsbrævamarknaðinum. Sum sæst á myndini, helt 10-ára danska rentan sær millum 3,45% og 3,55% allan mánaðin. Hetta er gott fyri realkredittlánsbrøv. Haraftrat komu fáar innloysingar í úrtíð til apríltermina, og hetta stuðlaði eisini undir teimum.

## Vestas verður kanska uppkeypt

Kursvirðið á danska vindmylluframleiðaranum Vestas hækkaði nógv í í farnu viku, tá óváttað tíðindi bórust um, at oljufelagið Shell er áhugað at keypa fyritøkuna til kurs 200. Kursurin er í løtuni um 135. Shell kundi hvørki vátta ella avsanna tíðindini. Hesa vikuna kunnger tryggingarfelagið TrygVesta roknskap. Felagið varð skrásett á keypsskálanum í Keypmannahavn í oktobur 2005, og hevur verið dúgliga handlað. Kursurin er hækkaður 54% síðan skrásetingina. Oljuprísurin er hækkaður aftur. Ein orsøk er yvirgangsatsóknin á Saudi Arabisk oljuverk. Høgi oljuprísurin kann leggja trýst á partabrøv hesa vikuna.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna koma ein rúgva av áhugaverdum kunngerðum, bæði í Evropa og í USA. ECB hevur rentufund hósdagin, og har er væntað at stutta rentan verður hækkað við 0,25%. Haraftrat koma týdningarmikil álitistøl og prísvakstrartøl. Haraftrat verður oljuprísurin í andgletti.

**Donsk 10-ára renta**





**Vísital fyri norrøn partabrøv**





**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 627,03 | 0,3% | ↑ |
| JPY | 5,37 | 1,3% | ↑ |
| GBP | 1.096,56 | 0,2% | ↑ |
| NOK | 92,68 | 0,1% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 102,48 | -0,1% | ↓ |
| | | | |
| Norrøn Partabrøv | 113,87 | 0,9% | ↑ |
| | | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*